## Stórsigur til Ukraina

Eitt av føroysku mótstøðuliðunum í komandi undankappingini er Ukraina, og teir løgdu bragdliga fyri, tá teir í gjár spældu venjingardyst móti Aserbadjan. Voronin, Nazarenko, Rotan, Gusev, Vorobei og Bielik vóru málskjúttar í dystinum, sum endaði við ikki minni enn 6-0 til Ukraina. Støðan í hálvleikinum var 4-0.

**-mørk**



## Klose skal brúka Adidas

Hóast hann í HM-kappingini spældi í Adidas og tá gjørdist toppskjútti við fimm málum, sigur Miroslav Klose, at hann kennir seg ikki heilt væl í týska fótbúnanum.vÍ Werder Bremen spælir Klose í Nike-skógvum, og hesar vil hann eisini sleppa at nýta á landsliðnum.

Trupulleikin er bara, at týska fótbóltssambandi og Adidas hava sáttmála, sum ikki loyvir hesum, og tað hevur fingið fleiri spælarar at reagera. Teir siga, at antin spæla teir í teimum skógvum, sum teimum dámar best. Ella spæla teir als ikki.

Ein líknandi træta var annars í Týsklandi fyri einum 20 árum síðani. Ta ferðina kravdi málverjin Harald Schumacher, at hann skuldi spæla í handskum frá Puma, meðan fótbóltssambandið vildi hava hann at spæla í Adidas.

**-mørk**

# Georgia krevur trý stig

**Týski venjarin hjá Georgia roknar ikki við nøkrum løttum dysti í Føroyum, men fólki krevur ein sigur í fyrsta dysti hansara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er eitt nýtt kapittul í fótbóltssøguni hjá Georgia, sum hol verður sett á, tá teir í kvøld skulu takast við Føroyar.

– Týski Klaus Toppmöller er nýggjur venjari, og setningurin verður í fyrsta lagi at fáa eitt so gott úrslit, sum yvir høvur gjørligt í komandi undankappingini, sigur Shalva Bibilashvili, sum starvast hjá georgiska ítróttarblaðnum, Sporti.

– Tað er eingin hjá okkum, sum roknar við einum løttum sigri, men kravið er kortini, at liðið fær trý stig. Við dystum móti bæði heims- og varaheimsmeistarunum í undankappingini er neyðugt hjá okkum, at teir báðir dystirnir móti Føroyum geva seks stig. Tað er í øllum førum tað, sum viðhaldsfólkini krevja, sigur hann.



*Týski landsliðsvenjarin hjá Georgia er ein royndur harri. Í fleiri ár hevur hann staðið á odda fyri liðum í týsku bundesliguni, men hetta er so fyrsta roynd hansara sum landsliðsvenjari*

### Ætla sær frameftir

Vanliga spælir Georgia eina væl skipaða 4-4-2, men í lokalu miðlunum verður gitt, at talan kanska verður um eina meira framrættaða skipan hesaferð. Ikki so nógv, tí týski venjarin hevur hug at undirmeta Føroyar, men heldur tí fleiri av føstu verjuspælarunum eru skaddir, og at venjarin tí ikki hevur eins nógvar møguleikar her, sum hann gjarna vildi havt.

Kaladze úr AC Milan, Khizanishvili úr Blackburn Rovers og Khizaneishvili úr FC Freiburg eru allir skaddir. Tí meta fleiri, at spælt verður við trimum í verjuni, men fram til dystarbyrjan tykist venjarin tó halda kortini nær at kroppinum.

Og hóast ein lítil spurnarkanning staðfesti, at 71% av fólkunum rokna við sigri til Georgia í kvøld, so staðfestir venjarin, at hann hevur størstu virðingina fyri Føroyum.

– Tað, sum eg havi sæð, bendir á, at talan verður um ein sera harðan dyst fyri okkara viðkomandi. Søguliga plaga Føroyar eisini at spæla sera væl í byrjanini av eini undankapping, og við nýggjum venjara og fleiri nýggjum spælarum er einki at ivast í, at teir vilja leggja sera nógv fyri, sigur Klaus Toppmöller.



*Besta føroyska úrslitið móti georgiskari mótstøðu fekk HB, tá teir fyri tveimum árum síðani vunnu 3-0 á heimavølli móti FC Wit*

# Georgia vekir buldralig minni

**Tá ið føroyingar fyri fýra árum síðani vóru til undankapping í Georgia fekk tað eftirspæl í UEFA**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í kvøld verður farið undir nýggju EM undankappingina, tá ið Føroyar á Svangaskarði taka ímóti Georgia.

Føroyar og Georgia hava ongantíð áður spælt landsdyst móti hvørjum øðrum á hægsta støði. Men føroyskur fótbóltur hevur fleiri ferðir kent sviðan av, at Georgia ikki er at spæla við, hóast landið ikki hevur luttikið í endaspølum, og hóast landið ikki er serliga ovarlaga á altjóða styrkislistanum.

Fyri tveimum árum síðani spældi HB í Europa Cup móti FC WIT úr Georgia. Á útivølli legði HB rygg til 5-0 tap. Á heimavølli gekk munandi betur, og tað hevði verið óført, um landsliðið í annað kvøld hevði gjørt HB tað bargdið eftir. HB vann 3-0!

Uttan at taka nakað frá óføra HB avrikinum ta ferðina, so spældi tað ivaleyst inn, at georgiska liðið á heimavølli so at siga hevði tryggjað sær víðari luttøku. Men georgiska liðið var týðuliga skelkað á Tórsvølli, og tað upplivilsið hevður landsliðsvenjari teirra ivaleyst mint sínar spælarar á, at hann á ongan hátt ynskir skal verða endurtikið.




Tvær ferðir áður hava føroysk feløg eisini spælt ímóti liðum úr Georgia. HB tapti samanlagt 9-0 ímóti Dinamo Batumi í 1996, og í 2002 tapti B36 6-2 ímóti Torpedo Kutaisi.

### Ferðin til Georgia

Í 2002 var føroyska U-19 landsliðið í Georgia, har Føroyar luttóku í EM undankapping. Hini londini vóru Ukraina, Georgia og Belgia. Føroyar endaðu aftast, og Ukraina vann kappingina. Georgia gjørdist næstbest, og Belgia endaði á triðja plássi.

Í uppgerðini millum heimaliðið og Føroyar vann Georgia 2-0. Føroyar megnaðu at halda tætt allan 1. hálvleik. Georgia skoraði í 62. og 82. minutti.

Venjari hjá føroyska U-19 landsliðnum ta ferðina var Jógvan Martin Olsen, sum nú er venjari hjá A-landsliðnum, og hann hevur fleiri av teimum, sum fyri fýra árum síðani vóru í Georgia, við á sínum liði. Hesir eru Hanus Thorleifsson, Símun Samuelsen og Hans Pauli Samuelsen. Bergur Midjord, sum eftir vikuskiftið gav avboð til henda landsdystin, var eisini við í Georgia fyri fýra árum síðani.

### Endaði í UEFA

Jógvan Martin Olsen kennir væl góða bóltførleikan hjá Georgia, og hann hevur saman við spælarunum sæð onkrar upptøkur, men tað hevur borið illa til at fáa tilfar har eysturi frá.

– Vit hava gjørt okkara besta, og vit hava brúkiligt tilfar, men sum so ofta áður, so hevur tað víst seg torført at samskifta við lond langt eysturi í fyrrverandi Sovjetsamveldinum, sigur Jógvan Martin Olsen.

Tá ið Føroyar vóru í Georgia fyri fýra árum síðani, lótu spælararnir illa at umstøðunum, sum teir búðu undir. Eftir heimkomuna setti FSF seg í samband við UEFA. Og sum skilst, so hevur eftirlitið við ferða- og uppihaldsumstøðum verið betri síðani.